## Eitt summarkvøld í Nólsoy

Eitt ferðalag hevði bílagt grillkvøld frá Kunningarstovuni í Nólsoy leygarkvøldið, og tá veðrið var so gott, gjørdu nólsoyingar av, sjálvir at hugna sær eina løtu, tá ferðalagið var farið til Havnar aftur. Og tað lá væl fyri í so máta. Væl hepnaðist, eisini tí veðrið var so gott. Har hugnaðu tey sær so við pylsum og búffum, og eitt lítið, hugnaligt bál varð eisini tendrað. Eisini varð eitt tjald, einar seks ferðir tríggjar metrar, sett upp í fall, at tað skuldi farið at dropa at himli.



## Fall av 4. hædd

Ringasta marran hjá øllum foreldrum – og barnaansarum eisini – varð veruleiki fríggjakvøldið í Holbæk í Danmark, tá ein bara eitt-ára gamal drongur datt ú av vindeyganum á fjórðu hædd. Drongurin og trý systkin hansara vóruð ansað av einari 16-ára gamlari gentu, meðan foreldrini vóru í Jútlandi. Drongurin var einsamallur í einum kamari, har trygdarskipanin á vindeyganum týðiliga ikki virkaði sum hon skuldi, tá vanlukkan hendi. Hann slapp kortini við nøkrum skurslum í andlitinum.

# Farin undir heilt



*Eyðun á Rógvi, formaður í Fíggingargrunninum frá 1992, er sum sokkin í jørðina*

**Hóast óteljandi uppringingar líka síðani tíðliga fríggjamorgunin, hevur tað verið ógjørligt at fáa fatur á formanninum í Fíggingargrunninum frá 1992**

PARTABRØV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ákoyringarnar hava verið nógvar á Fíggingargrunnin frá 1992 í sambandi við býtið av partabrøvunum í Føroya Banka.

Fleiri sera viðkomandi spurningar hava verið reistir, bæði av Sosialinum og av løgtingslimum frá ymiskum flokkum. Men higartil hevur verið ógjørligt at fáa eina viðmerking – fyri ikki at siga frágreiðing – frá Fíggingargrunninum sjálvum.

Frá nevndarlimum hava vit fingið at vita, at tað er ein greið avtala, at bert formaðurin skal úttala seg vegna grunnin, men tá hesin ikki er at fáa fatur á, gerst ikki nógv.

Er tað veruliga so, sum eitt nú John Johnnesen hevur róð upp undir, at slóðir kunnu fylgjast frá undanfarna fíggjarmálaráðharra til nýggja arbeiðsgevara hansara? So leingi Fíggingargrunnurin frá 1992 er tigandi sum grøvin, hanga slíkir spurningar í leysum lofti. Og tað kann neyvan vera áhugamálið hjá hvørki grunni ella formanni.

### Sokkin í jørðina

Tað er einki at taka seg aftur í, at tá Eyðun á Rógvi er sum sokkin í jørðina, so trívast illgitingarnar í besta lagi.

Fíggingargrunnurin frá 1992 skyldar føroyingum eina frágreiðing um, hvussu partabrøvini eru býtt, og eftir hvørjum kriterium hetta er gjørt. Herfrá skal grunnurin ikki leggjast undir nakað sum helst, men longri tíð gongur, uttan at grunnurin letur við seg koma, minni álit hava fólk á tí, grunnurin hevur skipað fyri.

Tað er púra óhugsandi, at Eyðun á Rógvi er óvitandi um, at blaðið hevur roynt at fingið fatur á honum, og tí er tað løgið, at formaðurin ikki hevur latið við seg koma á nakran hátt.

Sjálvandi kann hann vera uttanlands ella á annan hátt ikki at fáa fatur í, men spurningarnir eru so átrokandi, at teir mugu svarast so ella so. Finst einki svar, so er tað eisini svar nokk í sjálvum sær.

Men so leingi fólkið – og serliga tey, ið hava sett pening í bankan – einki fáa at vita, hanga gitingar og illgitingar í leysum lofti.

## Álvur frá sum formaður



*Álvur Danielsen leggur nú frá sær sum formaður í Føroya Filatelistfelagø*

**Eftir at hava fingið ætlanarskriv um uppsøgn og er útihýstur á Posthúsinum, hevur Álvur Danielsen nú gjørt av, at siga seg frá sum formann í Føroya Filatelistfelag**

Álvur Danielsen er vorðin ímyndin av uppsøgdu postboðunum. Hann hevur eisini verið formaður í Føroya Filatelistfelag, men viðurskiftini gera, at hann kennir seg í einari tvístøðu. Og tí hevur Álvur Danielsen nú gjørt av at siga seg frá sum formann í felagnum.

Álvur sigur í einari almennari fráboðan: »Eg fari hervið at boða frá, at eg leggi frá mær sum formaður í Føroya Filatelistfelag.

Hóast uppsøgn frá Postverki Føroya havi eg "varðveitt" lyklarnar til húsið á Óðinshædd. Hetta helst tí, at eg eri formaður í Føroya Filatelistfelag og havi havt hesa ábyrgd at lata upp dyrnar til fundir felagsins.

At varðveita hesa ábyrgd setur meg í tvístøðu; tí eg í ørindum fyri felagið eisini havi atgongd til alt húsið - og hesum kan eg ikki liva við, tá eg tá reelt kann verða lagdur undir bæði eitt og annað. Serliga í tí støðu sum eg eri í, har eg ikki kenni uppsagnargrundirnar hjá mær.

Nevndin er ikki samd um, at boða leiðsluni hjá Postverk Føroya frá, at vit "flyta út" úr húsinum sum felag og tískil leggi eg frá mær sum formaður.«

Álvur Danielsen leggur aftrat, at hann skjótast gjørligt fer at lata lyklarnar frá sær.